# Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

**Spyrjari:** Hervør Pálsdóttir, løgtingsmaður

**Svarari:** Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum

**Evni:** Frávera hjá næmingum á miðnámi í sambandi við koronu

**Spurningar:**

1. Verða næmingar á miðnámi skrivaðir fyri fráveru í skúlanum, um teir eru heima, tí teir hava koronu?
2. Verða næmingar á miðnámi skrivaðir fyri fráveru, um teir skulu kanna seg fyri koronu í skúlatíðini?
3. Um ja, hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at frávera vegna koronu skal verða góðtikin frávera?
4. Hvussu metir landsstýrismaðurin, at tað ber til at halda koronutilmælini á miðnámsskúlunum?

**Viðmerkingar:**
Nógv smitta av COVID-19 ger um seg í Føroyum hesa tíðina. Serliga eru tað børn og ung sum gerast smittað. Næmingar á miðnámi á Kambsdali og á Glasi vístu mánadagin á, at tey útseta seg fyri smittuvanda hvønn dag, tá tey møta í skúla. Á miðnámsskúlunum eru eisini nógvir næmingar, og tá møtast fleiri í bólki, enn almenna tilmælið á 50 fólk mælir til.
Frávera á miðnámi verður gjørd upp gjøgnum árið. Ov nógv frávera kann hava við sær, at næmingar verða koyrdir úr skúlanum. Stúran um ov høga fráveru kann hava við sær, at næmingar, sum møguliga burdu hildið seg heima, ella sum áttu at latið seg kanna, møta í skúla. Hesir spurningar verða settir fyri at fáa greiðu á, um fráveru uppgerðin hjá næmingum verður ávirkað, tá tey hava fráfall í skúlanum av orsøkum, ið hava samband koronustøðuna.

**Á Løgtingi, 9. november 2021**

Hervør Pálsdóttir